# Bangladesh á veg móti fólkaræði



*Kvinnurnar er frammarlaga í valstríðnum. Tær fingu eisini eina kvinnu til forsætismálaráðharra*

**Valið í Bangladesh var eitt gott stig fram móti fólkaræði. Frá føroyska eygleiðaranun, Lindu Joensen, hava vit fingið fyribils frágreiðingina**

VALEYGLEIÐING
*Óli Jacobsen*
*olij@sosialurin.fo*

Tað er sera lítið, sum hevur verið í miðlum um okkara leiðir um valið í Bangladesh tann 29. desember.

Eitt undantak er tó Sosialurin. Hetta hevur eina serligu orsøk. Í blaðnum tann 23. desember høvdu vit eina frásøgn um ein av eygleiðarunum hjá ES, Europeiska Samveldinum, við valið. Hetta var Linda Joensen, dóttir Dan hjá Alvin og Elisabeth Joensen í Vági.

Linda er partur av einum liði, sum ES hevði sent til Bangladesh. Tað vóru tilsamans 125 eygleiðarar úr trimum liðum frá teimum 25 ES londunum + Noreg og Sweits. Samlaða fólkatalið í hesum londum er um eina hálv milliard.

Føroyar kunnu tí vera errin um, at ein við tí serføroyska eftirnavninum Joensen hevur verið við í hesum eygleiðarahópi. Einki land hevur uppá seg verið so væl umboðað sum Føroyar.

Sum greitt varð frá á í umrøddu grein, er mannagongdin tann, at eygleiðarabólkurin ger eina fyribils frágreiðing um valið beint eftir, at tað er liðugt. Síðan verður ein endalig frágreiðing gjørd.

Vit hava frá Lindu fingið fyribilsniðurstøðuna hjá ES-eygleiðarunum og vegna føroysku luttøkuna halda vit tað vera av áhuga at endurgeva nakað av høvuðsinnihaldinum.

Fyrst kann sigast, at leiðarin í bólkinum er Alexander Graf Lambsdorff, sum er limur í EU parlamentinum.

Eygleiðararnir hava verið spjaddir um alt Bangladesh at eygleiða mannagongdina við valinum. Á valdegnum vitjaðu eygleiðararnir 800 valstøð í seks landspørtum í landinum.

"Longterm"-eygleiðararnir, sum hava verið við at lagt lag á, hvussu valið skuldi skipast, eru framvegis í landinum, har teir skulu fylgja gongdini eftir valið. Linda er ein av hesum 44. Í mars kemur endaliga frágreiðingin við tilmælum um ábøtur á mannagongdina til eitt komandi val.

Fyribils niðurstøðurnar eru í stuttum:

Parlamentsvalið í 2008 merkir eitt týðandi stig móti endurskipan av demokratiskum stýri í Bangladesh. Eitt vælskipað val og høg valluttøka lýsti ein avgjørdan vilja hjá fólkinum at venda aftur til fólkaræði, eftur at landið hevur verið í undantaksstøðu í fleiri ár. Burtursæð frá nøkrum tekniskum trupulleikum gekk valið, sum tað skuldi. Úrslitið av valinum verður mett at vísa støðuna hjá fólkinum til teir, sum bjóðaðu seg fram. ES eygleiðararnir merktu nevniliga einki til nakað slag av valsviki.

Tað er øll orsøk til at hava álit á valnevndini í Bangladesh. Hon hevur dugað at greiða tær avbjóðingar, sum hon hevur fingið. Hon hevur syrgt fyri, at valið livir upp til altjóða støði.

Tó telur tað frá, at um 3 milliónir 18 ára gomul ikki fingu nýtt sín rætt til at velja, tí skrásetingin av veljarum gekk ikki longur fram enn til 1. januar 2008. Tí fingu tey ikki valt, sum hava fylt 18 ár í 2008.

Onnur smávegis brek vóru eisini, men tey eru tó ikki so álvarsom, at tey skapa iva um úrslitið.

Annars var val hildið í 299 valdømum. Valskipanin er tann sama sum í Bretlandi. Ein tinglimur verður valdur í hvørjum valdømi og vinnarin er tann við flestu atkvøðunum. Tískil eru 299 tingfólk. Eingin eykavaldur er, og tí kann ikki roknast við, at samansetingin av tinginum er tann sama sum atkvøðubýtið millum flokkarnar. Men hetta er vanligt.



*Hálvføroyska Linda Joensen, sum býr í Noreg, í samrøðu við eitt valevni í Bangladesh*



*Sheikh Hasina er nýggi forsætismálaráðharrin í Bangladesh*

Tað vóru 38 skrásettur flokkar, og samlaða talið á valevnum var 1.538. Av hesum vóru 141 óheft valevni. Krøv vóru eisini sett til valevnini. Tey, sum til dømis høvdu framt svik, vórðu vrakað og komu ikki á listan, og tey vóru nokk so nógv. Summi valevni sluppu tó aftur á listan eftir hægstarættardóm.

Sum hjá okkum vóru allir vongir í politikki umboðaðir. Teir vóru frá verðsligum og sosialistiskum flokkum til islamiska fundamentalismu.

Valstríðið var friðarligt og sakligt og fór fram í einum góðum anda. Herurin var tó tilbúgvin, um nakað skuldi hent.

Fjølmiðlarnir spældu eisini ein leiklut, og eisini her eru tað loftmiðlarnir, sum fáa størri og størri týdning.

Í nógvum londum fara teir almennu miðlarnir ofta í part við teir ráðandi. Men í hesum førinum var senditíðin býtt so kristiliga millum flokkarnar, sum tað kundi gerast.

Hóast kvinnurnar gera seg galdandi í støðum, sum greitt frá í fyrru greinini, so stendur verri til, tá ið hugsað verður um heildina. Tað vóru bert 52 kvinnur millum tey 1.538 valevini.

Valluttøkan var høg, heili 80%. Samlaða talið av veljarum var um 80 mill, eitt sindur fleiri kvinnur enn menn.

## Kvinna verður forsætisráðharri

Tað vóru tvær høvuðssamgongur til valið. Báðar góvu stór vallyftir. Tær vildu útvega fólkinum bíligar vørur, og tær vildu berjast móti víðgongdum islamistum, sum gera um seg her eins og í øðrum líknandi londum. Tær vildu berjast móti korruptión, sum leiðararnir annars sjálvir hava verið ákærdir fyri. So vildu teir eisini seta gongd í vøkstur í samfelagnum. Hetta er alt slíkt, sum er sera tiltrongt.

Fyrrverandi forsætisráðharrin Sheikh Halina, sum stendur á odda fyri Awami ligaini vann stórsigur, og flokkurin væntast at fáa 230 sessir í tinginum. Tað var hesin flokkur sum stóð fyri loysingini frá Pakistan í 1971.

Tann stórti taparin er tískil tjóðskaparflokkurin við fyrrverandi forsætisráðharranum Khaleda Zia á odda. Sum vanligt er hjá taparum hevur hann eisini klagað um valið, hesum fæst neyvan nakað burtur úr. Báðir oddamennir høvdu annars lovað at virða almenna valúrslitið, men hetta er lættari hjá sigurharranum enn hjá taparanum! Tað hevur annars verið nakað av ófriði eftir valið, og higartil er boðað frá tveimum, sum eru deyð.

Nýggi forsætisráðharrin eitur Sheikh Hasina Wazed. Hon er dóttir og elsta barn hjá Sheik Mujibur Rahmann, sum verður roknaður sum stovnarin av Bangladesh, og sum eisini var fyrsti forsætisráðharrin Bangladesh. Hann varð myrdur í 1975. Hasina er 61 ára gomul. Hon hevur verið floksmaður í Awami ligaini síðan 1981. Tað hevur gingið upp og niður hjá henni við politiska viðrákinum, men hon var forsætismálaráðharri 1996-2001. Hon giftist í 1968 við kjarnorkuvísindamanninum M.A. Wazed. Tey eiga tvey børn, sum bæði búgva í USA.

Vit kunnu bert fegnast um, tá ið tað gongur framá við fólkaræðinum úti í heimi. Tað er einki at ivast í, at nýggja stjórnin fær nóg mikið av avbjóðingum.